

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 07 - 2012

# Kina sendir ísbrótara til Arktis

Um somu tíð sum eitt av heimsins størstu oljufeløgum, Shell sendir ein stóra flota av oljuskipum til Arktis at bora eftir olju og gassi, hevur Kina gjørt av at senda ísbrótaran Xue Long til leiðirnar við Arktis. Hann er júst farin úr Shanghai á eina kanningarferð í Arktis, sum fer at vara í tríggjar mánaðir. Umleið 120 fólk eru við skipinum, harímillum granskarar úr Fraklandi, Danmark, Íslandi og Taiwan. Sambært China Daily skulu granskararnir kanna tær avleiðingar, sum broyingar í vistfrøðiskipanini í Arktis, kann fáa fyri Kina og heimin sum heild. Hetta verður tann størsta kanningarverkætlan í Arktis, sum Kina hevur staðið fyri. Seinast ísbrótarin var í Arktis var í 2010. Skipið hevur eisini gjørt nógvar kanninarferðir til Antarktis. Kanninarnar, sum liggja fyri framman, snúgva seg m.a. at kanna ísviðurskiftini í Beringssundinum, Beringshavinum, Chukchihavinum og Beuforthavinum og eisini økini norðan fyri Kanada. Tá kanningarnar eru lidnar fer ísbrótarin til Íslands á eina fimm daga granskaravitjan. Kina og Ísland hava góð diplomatisk viðurskifti og hava nýliga styrkt um samstarvið í Arktis siga kinesiskir myndugleikar í tíðindaskrivi. Herfyri vitjaði kinesiski forsætisráðharrin í Íslandi fyri at samráðast um samstarv innan geotermiska orku og handil. Hetta verður so fyrstu ferð, at ein kinverskur ísbrótari vitjar Ísland og boðar tað eisini frá nýggju tíðunum, har alsamt vaksandi áhugi er millum nógvar tjóðir, eitt nú Kina og EU at vera við at kanna og troyta framtíðar møguleikar í arktiska økinum. Bæði Kina og EU royna eisini at fáa eygleiðarastøðu í Arktiska Ráðnum, har USA, Kanada, Rusland, Noreg og Danmark eru tey leiðandi londini.